# Projektkapping um nýggja kirkju á Glyvrum

## Dómsnevndarálit

Í apríl 2007 bjóðaði kirkjuráðið fyri Glyvra kirkju til almenna projektkapping um nýggja kirkju á Glyvrum.

Tá freistin fyri at lata uppskot inn var úti, vóru 15 uppskot komin inn, og vórðu øll tikin upp til dømingar.

Dómsnevndin hevur verið henda:

Vegna kirkjuráðið fyri Glyvra kirkju:

Sigmar Davidsen, næstformaður í kirkjuráðnum, formaður í dómsnevndini
Meinhard Bjartalíð, prestur og kirkjuráðslimur
Símun Mittún, kirkjuráðslimur
Durita P. Joensen, kirkjuráðslimur

Vegna Arkitektafelag Føroya

Gunnar Hoydal, arkitektur AF
Jan Olav Jensen, civilarkitekt MNAL

Sum ráðgevarar við ongum avgerðarrætti hava hesi verið dómsnevndini til hjálpar:

Eliesar Kastalag, byggifrøðingur hjá Runavíkar kommunu
Jóhannes Steingrund, ljóðserfrøðingur
Hans Jacob Lamhauge, formaður í kirkjuráðnum
Páll Rasmussen, kirkjuráðslimur
Eyðálvur Knudsen, kirkjuráðslimur

Kappingarskrivari hevur verið:

Tórálvur Weihe, arkitektur AF

Dómsnevndin byrjaði arbeiðið sítt tann 16. juli og hevur síðani havt í alt 6 fundir. Tá dómsnevndin endaði arbeiði sítt tann 18. juli, var hon samd um hesar niðurstøður og viðmerkingar:

Dómsnevndin hevur avgjørt at lata hesar virðislønir:

1. virðisløn kr 150.000: uppskot nr 2/37773
2. virðisløn kr 90.000: uppskot nr 4/42702

Dómsnevndin hevur samstundis gjørt av at keypa hesi uppskot:

Uppskot nr 8/35813, innkeyp kr 20.000
Uppskot nr 11/50250, innkeyp kr 20.000
Uppskot nr 12/17327, innkeyp kr 20.000

At enda gevur dómsnevndin hesar heiðrandi umrøður:

Uppskot 3/18181
Uppskot 5/13501

## Almennar viðmerkingar

Dómsnevndin metir, at kappingin hevur verið væl eydnað, og at tey 15 uppskotini geva eina góða mynd av teimum møguleikum, sum eru at byggja eina virðiliga og tíðarhóskandi kirkju á hesum staði.

Kappingin sýnir samstundis, at byggiøkið er krevjandi, við høvuðsvegnum í erva og tí stóra hallinum oman móti fjøruni.

Nógv uppskot taka støðu í gomlum føroyskum siði at koma inn í kirkjuna vestanfyri og ganga fram móti altarinum eystanfyri. Hetta gevur í summum førum trupulleikar at skipa kirkjuna. Dómsnevndin vísir á, at krav er ikki í kappingarskránni, at kirkjan skal standa eystur og vestur, og nevndin hevur í hvørjum einstøkum føri kannað um betri skipan fæst, verða uppskotini loyst úr hesum hafti.

Dómsnevndin leggur dent á atkomuviðurskiftini, og at kirkjutúnið verður snøgt og rúmligt fram til kirkjudyrnar.

Nevndin heldur tað vera rætt at hava biløki við minst møguligum hæddarmuni móti inngongdini og vísir í hesum sambandi á uppskot 4/42702.

Kappingin vísir, at í høvuðsheitum hava luttakararnir víst á tvey ymisk sløg av kirkjubygging: Annað slagið er kirkjan, sum ger vart við seg úteftir og verður savningarmerki í tí bygda økinum og í landslagnum, og hitt er kirkjan, sum er eyðkend, men sum lagar seg meira stilført til staðið, har hon stendur og vendir sær heldur inneftir móti tí, sum fer fram í kirkjuni.

Nøkur uppskot vísa til hevdina við vanligum kirkjuskipi. Onnur vísa á meira sundurbýtt rúm, sum kunnu geva aðra og øðrvísi nýtslu enn ta siðbundnu. Dómsnevndin heldur, at uppskotini hvørt í sínum lagi vísa á áhugaverdar loysnir.

### 1. virðisløn kr 150.000: uppskot nr 2/37773

Kirkjan er einføld og kortini rík.

Hon hevur eitt greitt skap uttan, ger friðarliga og virðiliga vart við seg, høg og við sínum torni eins og í gomlum føroyskum byggisiði. Um dagin sílar ljós inn í kirkjuna, og um kvøldið lýsir hon í myrkrinum.

Serstakliga áhugavert er sjálvt kirkjurúmið, har tað bogaða skapið á umveggjunum og svalarnir í tveimum hæddum geva møguleikar hjá kirkjufólkunum at koma nær og savnast um kór og altar. Rúmið er fjálgt og savnandi, annaðhvørt nógv ella fá fólk eru í kirkju.

Dómsnevndin mælir til at snara kirkjuni, og at ymisk viðurskifti annars verða greinað nærri.

Dómsnevndin heldur, at hetta uppskotið er besta grundarlagið fyri tí framhaldandi arbeiðinum at byggja nýggja, tíðarhóskandi kirkju í sókníni.

### 2. virðisløn kr 90.000: uppskot nr 4/42702

Kirkjan er bygningur, sum við sínum sermerkta skapi ger vart við seg, ikki bara í sókníni, men um allan fjørðin.

Teir stóru bogarnir í skiftandi hædd, lægstir móti vegnum og hægstir og smalri móti fjørðinum geva eitt sjáldsamt og hugtakandi kirkjurúm. Ógvuliga miðvíst er hon sett við kirkjutúni móti vegnum og við blómulund í tí stóra skráanum oman móti kirkjugarðinum, eitt vakurt friðskjól, sum kann gerast prýði í øllum økinum.

Kirkjan er væl skipað innan, tó ger skapið, at kirkjurúmið verður langt og smalt, soleiðis at tey aftastu kirkjufólkini sita nakað langt frá kóri og altari. Gott samband er millum forkirkjuna og tiltaksrúm.

Uppskotið er væl lýst og áhugavert sum dømi um kirkjuna sum eitt serstakt merki í umhvørvinum.

### Innkeyp kr 20.000: uppskot nr 8/35813

Uppskotið vísir til føroyska náttúru og við sínum skapi á veggjum og innvikum stendur kirkjan sum drangar í sjónum, ið verja tað, sum fer fram í kirkjuni.

Dómsnevndin heldur, at hetta gevur eitt spennandi kirkjurúm við nógvum dygdum. Kortini hevur uppskotið ymiskar veikleikar í skipan av kirkjuni innan.

Uppskotið er sermerkt og áhugavert sum byggilist.

### Innkeyp kr 20.000: uppskot nr 11/50250

Uppskotið er yrkisliga væl úr hondum greitt. Flestu krøv í byggiskránni eru væl loyst. Byggingin er væl skapað og hevur listarliga kenslu. Kortini ivast dómsnevndin í, um tað kirkjuliga kemur nóg væl fram í hesi bygging, sum annars í mangar mátar er áhugaverd.

### Innkeyp kr 20.000: uppskot nr 12/17327

Uppskotið er ógvuliga greitt og yrkisliga væl lýst í mun til krøvini í kappingarskránni. Vøkur og skiftandi rúm eru komin burturúr, støddir og skap eru góð.

Dómsnevndin heldur, at byggilistarliga er uppskotið kortini heldur alment bæði innan og uttan og vísir seg neyvan nóg væl sum ein eyðkendur kirkjuligur bygningur.

### Heiðrandi umrøðu: uppskot 3/18181

Uppskotið vísir áhugaverda samskipan av bygningi og torni við stórum glasi í tekjuni. Uppskotið hevur eina sjáldsama skipan av rúmum við einum taktum garði í miðjuni. Tó koma fram fleiri ivamál í mun til settu krøvini, m.a. rúmast í sjálvum kirkjurúminum neyvan meira enn góð helvt av tí ásetta fólkatalinum.

Uppskotið er áhugavert sum ein framkomin roynd at gera eina kirkju, ið sæst væl aftur.

### Heiðrandi umrøðu: uppskot 5/13501

Hugskotið í uppskotinum er at at býta upp innihaldið í nýggju kirkjuni í tríggjar serstakar eindir: Eina kirkju niðri við sjóvarmálan, meinigheitshøli omanfyri kirkjugarðin, og konfirmanthøli í upprunaligu gomlu kirkjuni umframt torn.

Uppskotið er ikki neyvt lýst, og tað er trupult at skilja øll viðurskifti. Kortini heldur dómsnevndin tað vera áhugavert dømi um øðrvísi loysn av settu uppgávuni.

Glyvrar tann 19. juli 2007

| | | |
|---|---|---|
| Sigmar Davidsen<br>formaður | Meinhard Bjartalíð | Símun Mittún |
| Durita P. Joensen | Gunnar Hoydal | Jan Olav Jensen |